# Nógv herverk gjørt í Havn

Eyðun Klakstein

Løgreglan í Havnn fekk í vikuskiftinum fráboðanir um átta herverk, sum vóru gjørd ymsastaðni í høvuðsstaðnum.

Leygarnáttina tveitti onkur eina fløsku eftir einum bili, sum fekk smærri skaða. Og ein persónur, sum ikki slapp innar í eini hús í Havn, gjørdist í øðini, breyt ein rút í hurðini og smildraði postkassan.

Sunnunáttina stutt eftir midnátt gjørdist ein maður so óður, tá hann ikki slapp inn í Kaggan í Havn, at hann breyt tveir rútar í klubbanum.

Løgreglan í Havn fekk sunnudagin fráboðan um, at umfatandi herverk var gjørt á ein parkeraðan bil í býnum, og uttanfyri Badmintonhøllina, har tiltak varð leygarkvøldið, hevði onkur gjørt seg inn á nakrar betongplátur, sum stóðu uttanfyri.

Í vikuskiftinum var eisini innbrot framt á skrivstovuni hjá Skógrøkt Landsins, sum heldur til á Hvítanesvegnum í Havn. Har var ein rútur brotin, og viðkomandi, sum var komin á vitjan, legðist á ein pengakassa, sum varð brotin upp. Tað vóru tó eingir pengar at heinta í hesum kassa.

# Tríggir fingu snuddir í bardaga

Sunnunáttina komu tríggir ungir mans til skaða í Niels Finsensgøtu í Havn.

Ein varð sparkaður, annar varð stútaður og ein triði smekkaði skallan í ein bilrút. Løgreglan í Havn heldur, at talan hevur verið um ein og sama bardaga, og at teir tríggir ungir menninir vóru í lag.

Løgreglan sigur seg ikki vita, hvussu nógv fólk hava verið blandað upp í rokið, men tey hava fingið upplýsingar um ein av monnunum, sum gjørdi seg inn á hesar tríggjar unglingarnar, sum vóru komnir av bygd til Havnar í vikuskiftinum.

**ek**

# Fleiri ferðsluóhapp

Hóst koyrilíkindini vóru góð í vikuskiftinum, fekk løgreglan í Havn fráboðan um heili seks ferðsluóhapp.

Talan var um smærri óhapp, har eingin fólkaskaði var.

Á Politistøðini verður sagt, at nógv av óhappunum skyldast, at fólk ikki ansa nóg væl eftir, tá tey koyra.

Høvdu fólk verið meira ansin í ferðsluni, slapst undan nógvum av hesum smærru óhappunum, verður sagt á Politistøðini.

**ek**

# Nógv drukkin fólk

Tað var eftir øllum at døma eitt váttligt vikuskifti í høvuðsstaðnum.

Í øllum førðum hevði løgreglan í Havn meira at gera av fólki, sum hava fingið ov nógv upp í høvdið.

Trý fólk hava sovið á Politistøðini, og tað er eitt vanligt tal fyri eitt vikuskifti, men løgreglan hevur havt meira enn vanligt at gera við at koyra drukkin fólk heim.

Vanligt er altíð onkur, sum løgreglan má fáa heim fríggjakvøl og leygarkvøld, men hetta vikuskiftið var talan um fleiri fólk enn vanligt, verður sagt av Politistøðini í Havn.

***ek***

# Tikin viðhassji uppi á sær

Løgreglan í Vágum handtók sunnudagin seinnapartin ein gamlan kenning hjá sær, og hesin maðurin var í gjár førdur til Havnar, har løgreglan á rættarfundi fór at krevja hann fonglsaðan.

Tað var leiðarin av Keypsamtøkuni í Vágum, sum kom fram á mannin, tá hann á alljósum degi hevði brotið inn í Keypsamtøkuna og stolið 10 kartongir av sigarettum.

Løgreglan varð boðsend, og hon kom síðani fram á, at maðurin hevði 3 til 4 gram av hassji uppi á sær.

Løgreglan í Vágum sigur, at maðurin er ein gamal kenningur hjá løgregluni, og at málið nú er latið kriminalpolitinum í Havn.

Maðurin skuldi fyri á rættarfundi í Føroya rætti seinnapartin í gjár.

**ek**



*Sunnunáttina gjørdi onkur seg inn á Havnar Kirkju*

# Innbrot í Havnar Kirkju sunnunáttina

*– Tað er sera óheppið, at kirkjan ikki fær frið, sigur Bjarni Bæk, dómpróstur*

Eyðun Klakstein

Sunnumorgunin gjørdist fólk varug við, at innbrot hevði verið í Havnar Kirkju.

Løgreglan, sum hevur verið í kirkjuni og kanna hendingina, sigur, at hurðin er sparkað inn, síðani er ein skápshurð skrædd frá, og roynt hevur síðani verið at sleppa inn í eitt brandskáp.

Hetta eydnaðist ikki, og síðani eru tann ella tey, sum hava verið í kirkjuni, farin á dyr aftur. Løgreglan veit ikki, hvør hevur framt innbrotið í kirkjuna.

Í brandskápinum, har roynt hevur verið at bróta inn, goymir kirkjan gamla silvurið og altarvínið, sum er alkoholfrítt. Eingir pengar verða goymdir í føroysku kirkjunum.

## Virðing

– Tað er óvanligt, at fólk bróta inn í kirkjur í Føroyum, og eg má siga, at tað er sera keðiligt, at slíkt hendir. Fólk hava vanliga størri virðing fyri kirkjuni enn hetta, sigur Bjarni Bæk, dómpróstur í Havn.

– Fyrr stóðu kirkjurnar altíð opnar, men nú eru tær flestu stongdar, tá eingi fólk eru har. Og nú fáa tær eftir øllum at døma ikki frið, tá tær eru stongdar, og tað haldi eg verða sera óheppið.

Sunnumorgunin var gudstænastan hildin sum vanligt, og Sonja Klein, prestur, prædikaði.

– Nú skulu vit hava onkran at hyggja eftir hurðini, sum hevur fingið nakað av skaða. Helst verður neyðugt at skifta hana, sigur Bjarni Bæk, dómpróstur.

# Vindurin gjørdi um seg

Eyðun Klakstein



*Ein av bingjunum mundi endað á sjónum. Vindur var av tí mesta í Klaksvík leygardagin*
**Mynd: Símun á Høvdanum**

Leygardagin var nógvur vindur, og fleiri stormskaðar vóru kring landið – serliga norðan fyri.

Á Strondum hendi skaði á ein bygning hjá Stranda Máling, sum er í gerð. Yvirtromin datt niður í grundina, og har varð hon liggjandi. Neyðugt var tí ikki við nøkrum bjargingararbeiði í ódnarveðrinum.

Í Klaksvík var vindurin av tí mesta, og fleiri smærri skaðar vóru. Ein rútur fór í Fimleikahøllini, ein bingja varð tikin av vindum og mundi endað á sjónum, tekjan á einum hjalli reiv, og ein skúrður fekk skaða. Sløkkiliðið í Klaksvík var fleiri ferðir úti leygardagin.

Í Havn fór ymiskt á flog, sum hevði ligið og rikist, men stórvegis skaði spurdist ikki burtur úr hesum. Sløkkiliðið í Havn var boðsent, tá fólk hildu, at eitt træ uttan fyri Havnar Klubba var um at fara um koll. Hetta forðaði sløkkiliðið tó fyri.

Í Kaldbak datt ein ellinja niður í nógva vindinum.

Í Suðuroy og Vágum siga løgreglustøðirnar, at nógvur vindur var leygardagin, men tey hava onga fráboðan fyri um nakran stormskaða.



*Ivi um trygdina hjá sjúklingum, ið hava brúk fyri bráðfeingis hjálp:*

# Nýggja flogfarið setti seg í Vágum uttan trupulleikar

*Ivi hevur verið sáddur um trygdina hjá føroyskum sjúklingum, ið hava tørv á bráðfeingis flutningi til Danmarkar, eftir at danir keyptu tað nýggja challengerflogfarið, tí tað skuldi ikki fáa sett í Vágum*

Áki Bertholdsen



*Tað nýggja Challengerflogfarið hjá danska flogvápninum kann ikki brúkast gil sjúkraflutning úr Føroyum og tað kann fáa lívshóttandi avleiðingar, siga danir. Tað avsanna føroyskir myndugleikar, tí trygdin er betri nú, enn hon var fyrr*

– Trygdin hjá føroyskum sjúklingum, sum hava brúk fyri bráðfeingis flutningi til Danmarkar, er ikki komin í vanda.

Tað staðfestir Jógvan Elias Tomassen, leiðari á Landssjúkrahúsinum.

Annars hevur ivi verið sáddur um trygdina hjá sjúklingum, sum hava tørv á skjótum flutningi til donsk sjúkrahús.

Hesin ivin er sprottin í kjalarvørrinum á kjakinum í Danmark um tað nýggja Challenger flogfarið hjá danska flogvápninum, sum hevur fingið summi at halda, at nú er trygdin tikin undan sjúkraflutninginum úr Føroyum til Danmarkar, í hvussu so er, har tað hevur skund.

Summastaðni í Danmark hevur stór ónøgd verið við tað nýggja challenger flogfarið, sum er keypt ístaðin fyri gulfstream flogfarið, sum datt niður í Vágum fyri árum siðani.

Eitt nú hevur verið ført fram, at tað er óegnað til sjúkraflutning úr Føroyum, tí tað fer ikki sett seg í Vágum av tí at vøllurin er ov stuttur.

Eitt nú tosaði danska útvarpið ein dagin fyri kortum við ein yvirlækna á deildini fyri ov tíðliga fødd børn á ríkissjúkrahúsinum.

Og honum dámdi onki støðuna.

Hann segði, at tað fleiri ferðir um árið var brúk fyri bráðfeingis sjúkraflutningi úr Føroyum og í teimum førum, har tíðin var avgerðandi, kundi tað fáa lívshóttandi avleiðingar, at challenger flogfarið ikki kann brúka flogvøllin í Vágum.

Yvirlæknin segði, at boð vóru eftir hesum jetflogfarinum hjá danska flogvápninu nakrar ferðir um árið, tá ið flutningurin hevði skund og tað ikki bar til at fáa fatur á sjúkraflutningsflúgvara hjá Falck, ella tað ikki bar til at fáa sjúklingin til Danmarkar við vanligum jetflogfari.

Annars hevur eitt herkules flogfar hjá danska herinum verið brúkt, men tað er ikki so væl hóskandi, tá ið flutningurin hevur skund, tí tað flýgur ikki so skjótt sum jetflogførini.

## Brúkti hálvan vøllin

Men eftir hvat skilst á føroyskum myndugleikum, er ongin orsøk at stúra fyri trygdini hjá føroyskum sjúklingum.

– Challenger flogfarið var í Vágum í farnu viku og tað brúkti ikki meiri enn hálvan vøllin, sigur Finnbogi Niclassen, leiðari á flogvøllinum.

Hinvegin viðgongur Lars Fynbo, generalmajorur í danska flogvápninum í Aktuelt, at tað kann vera trupult hjá flogfarinum at fara á flog í Vágum við fullari last undir ávísum umstøðum og at flúgva til Danmarkar út í eitt.

—Tó ber tað til at fara á flog við fimm fólkum og so eru møguleikar at millumlenda í Noregi ella í Skotlandi.

– Men hetta eru ikki trupulleikar, ið standast av, at flogfarið er ov vánaligt.

– Hetta eru trupulleikar, sum standast av, at flogvøllurin er ov stuttur.

Hann heldur, at 150 milliónir høvdu verið nógv betri brúktar til at leingja vøllin í Vágum 200 metrar, sum talan hevur verið um í mong ár, heldur enn at brúka pengingin uppá eitt nýtt flogfar.

Annars vísir hann á, at flogvápnið hevur eisini eitt herkulesflogfar, sum er serbygt til at brúka stuttar vallir.

– Tað ber eisini til at seta útgerð í Herkulesflogfarið í eini handavending, sum ger, at tað ber til at leggja sjúklingar undir skurð, ímeðan flogið verður, tá ið tað stendur um lív.

Niðurstøðan hjá Lars Fynbo er, at sum heild er Challenger tað besta flogfarið, sum flogvápnið kundi fáa fyri tann pening, sum var til taks.

Hann sigur, at skulu vit hava eitt flogfar, sum er serbygt til sjúkraflutning, hevði tað verið rættast at útvega eitt veruligt sjúkraflutningsflogfar.

## Stúra ikki

Men hesin ivin, sum hevur verið í Danmark um sjúkraflutningin úr Føroyum, ger seg ikki galdandi í Føroyum.

Jógvan Elias Thomassen, leiðari á Landssjúkrahúsinum sigur, at hetta er als ikki nakað, sum tey hava hugsað um sum eitt vandamál.

Hann sigur, at tað er nakrar ferðir um árið, at sjúklingar hava brúk fyri bráðfeingisflutningi til Danmarkar.

– Men vit biðja bara um hernaðaðarflogfar, tá ið allir aðrir møguleikar eru troyttir, tí tað er síðsti útvegur.

Men hesa seinastu tíðina hevur tað verið Atlantsflog, sum hevur verið brúkt til hetta endamálið.

Hann sigur, at um næturnar, tá ið Atlantsflog er í Føroyum, hevur ikki staðið á at fingið føroyska flogfarið at røkt hesa uppgávuna og tað hevur riggað av-bera væl.

Og hann ivast heldur ikki í, at skuldi tað komið fyri í ringasta føri, at sjúkraflutningur hevði yvirlappað regluligu rutuflúgvingina eitt sindur, hevði, tað ikki gjørt nakað.

Jógvan Elias Thomassen sigur, at samanumtikið er hetta ein nógv tryggari flutningur, enn talan var um frammanundan.

– Fyri tað fyrsta er flogfarið hjá Atlantsflog í Føroyum og tí er skjótari at fáa sjúklingin til Danmarkar, enn um flogfar fyrst skuldi komið úr Danmark.

– Harafturat er tað léttari at sleppa á flog, tá ið líkindini eru vánalig, enn tað er at seta seg.

– Tí vita vit altíð, nær sjúklingurin sleppur avstað og hetta er ein stórur fyrimunur.

Tað er nevniliga komið fyri, at tað ikki hevur borið til at fingið sjúkling til Danmarkar so skjótt sum ætlað, tí flogfarið fekk ikki sett seg.

Annars eru fleiri aðrir møguleikar at fáa sjúkling til Danmarkar, eitt nú við vanligum rutuflogfarið um dagin.

Men tað ber eisini til at senda boð eftir sjúkraflutningsflogfarið hjá Falck, ella eftir einum hernaðarflogfari, eitt nú herkulesflogfarinum, um umstøðurnar krevja tað.

Jógvan Elias Thomassen sigur, at síðani heilsuverkiðer farið at brúka Atlantsflog, er trygdin hjá føroyskum sjúklingum sostatt økt afturímóti tí, hon var frammanundan

Í fjør vóru sjey sjúkraflutningar úr Føroyum til Danmarkar.

## Ongin formlig avtala

Leiðarin á Landssjúkrahúsinum sigur, at at tað er ongin formlig avtala ímillum heilsuverkið og Atlantsflog um sjúkraflutning.

Men hann heldur, at tíðin man fara at nærkast, at tað verður neyðugt at tosa- við- Atlantsflog um hetta.

Annars skal fundur vera í næstum ímillum Atlantsflog og heilsuverkið um sjúkraflutning.

Men evni á tí fundinum er ikki at gera nakra beinleiðis avtalu um sjúkraflutningin.

– Endamálið við tí fundinum er at gera eina avtalu um, hvussu farast skal fram, tá ið vit biðja um sjúkraflutning, tí tað skal nógv setast í verk, áðrenn eitt flogfar fæst í luftina, sigur Jógvan Elias Thomassen, sjúkrahúsleiðari.


